Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jenis av Rana, løgtingsmaður

Svarari: Aksel Johannesen, løgmaður

Evni: Luttøka á NATO-fundum

Spurningar:

1. Hvussu langt eru ætlanirnar komnar um at senda ”ein føroyskan ministara”, sum løgmaður málber seg í útvarpinum, saman við danska uttanríkisráðharranum á NATO-fundir?
2. Verður tað landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, sum fer saman við danska ministaranum á hesar fundir?
3. Metir løgmaður ikki, at hesar kreativu ætlanirnar, at javnseta ”ein føroyskan ministara” við donsk embætisfólk, mugu leggjast fyri Uttanlandsnevndina til ráðførslu og/ ella fyri Løgtingið?

Viðmerkingar:
Spurningarnir byggja á útsagnir løgmans í Kringvarpinum hóskvøldið 8. juni, aftaná júst lokna samstarvsfundin í Grønlandi sama dag.

Ætlanirnar føroyinga um at fáa atgongd til NATO-fundir eru ikki nýggjar. Farna samgongan royndi tað, hon kundi, men tó eydnaðist ikki at fáa NATO-dyrnar opnaðar fyri føroyska uttanríkisráðharranum.

Tað munnu vera fleiri, sum hildu seg hoyra skeivt, tá løgmaður, eftir at hava gjørt vart við, at Føroyar ynsktu at verða við á NATO-fundum, legði afturat, at, og her verður endurgivið úr útvarpssamrøðuni: ”har tað er møguligt sjálvandi hjá danska uttanríkisministaranum, hann hevur embætisfólk við, har kundi hann eisini havt ein føroyskan ministara við, soleiðis at vit beinleiðis eisini hava møgululeika á fyrstu parket at hoyra tað, sum verður sagt, og hvat liggur í kortunum.”.

Á Løgtingi, 13. juni 2023

Jenis av Rana